# Law Firm Heygum Petersen Thomsen

Bjørn á Heygum, advokatur
Alfred Petersen, advokatur
Jónfinn Thomsen, advokatur
Birgit á Heygum, advokatfulltrúi
Djóni Thomassen, advokatur

Bøgøta 16, Postboks 164
FO-110 Tórshavn
T +298351710
M +298788400
djoni@adv.fo


Tórshavn, tann 14. mai 2020
Djóni Thomassen, adv.
J.nr. 10106/dt

## Ú T B J Ó Ð I N G A R T I L F A R

## Í B Ú Ð A R B Y G G I N G  V E S T A N  F Y R I  F R Æ L S I  Á  E I Ð I





Eiðis kommuna ynskir at bjóða tykkum at byggja íbúðir við tilhoyrandi parkering og uttanumøki á gamla kampingøkinum vestan fyri Frælsið.

Útboðið verður skipað eftir kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn, ið m.a. ásetur, at fastogn hjá kommununi skal verða boðin út alment, áðrenn ognin verður seld. Gamla kampingøkið er partur av ognini matr. nr. 469 a, Eiði. Byggiøkið verður matrikulerað frá, so tað verður sjálvstøðugt matr. nr. við einari vídd á umleið 2.800 $m^2$.

Kommunan bjóðar økið út til íbúðarbygging, har tað stendur teimum bjóðandi opið, hvussu byggingin sær út og hvat slagið av íbúðum verður. Kommunan setir sum treyt, at tað verða minst 5 íbúðir og kommunan sær helst, at talan er um fjølbroyttar bústaðarmøguleikar og bygging, sum fellur væl inn í tað vakra landslagi og at byggingin útnyttar tað einastandandi stórfingna og fría útsýnið.

Staðsetingin er einastandandi vælegnað til íbúðarbygging. Tað liggur soleiðis fyri, at tað er fullkomiliga frítt og stórfingið útsýnið til nærum allar ættir. Økið er beint við skúlan og ítróttarhøllina. Tað er stutt oman í bygdina at keypa inn. Tað er eisini stutt oman á fótbóltvøllin við alskyns framkomnum hentleikum.

Byggingin skal verða í samsvar við byggisamtyktina fyri Eiðis kommunu. Byggingin skal eisini lúka galdandi ásetingar fyri bygging, herundir bygningskunngerð 2017 (BK17).

Útbjóðingin er løgd soleiðis til rættis, at tað verður komið fram til bestu loysnina, sum tryggjar eina fjølbroytta og snøgga bústaðarloysn í høgari góðsku sum vónandi tekur seg væl út í vakra umhvørvinum.

Tað kann verða ein møguleiki fyri samstarvi við Bústaðir (Føroya bústaðarfelag), sum hevur sagt seg verða sinnað at verða ein samstarvsfelagi í íbúðarbyggingini.

Vit vóna, at tit taka væl ímóti hesum møguleika og at tit eru sinnaði at verða við til at betra um bústaðarmøguleikarnar á Eiði við fyrstu verkætlan av hesum slag í kommununi.

Á Eiði tann 14. mai 2020

Jógvan í Skorini, borgarstjóri

INNIHALDSYVIRLIT


1. INNLEIÐING 4
2. ÚTBJÓÐINGIN 4
3. TREYTIR TIL BYGGINGINA 4
4. TILBOÐINI 5
5. TÍÐARFREISTIR OG MANNAGONGD 6
6. FYRISPURNINGAR 6
7. MEGINREGLUR FYRI METING AV TILBOÐUM 6

1. INNLEIÐING

Útboðið verður skipað eftir kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn. Tað verður orðaður keypssáttmáli uppá økið, har tað verður sett sum krav, at vinnandi tilboðsgevarin keypir økið og fremur verkætlanina innan ásetta tíð. Keypssáttmálin verður m.a. treytaður av loyvi frá Umhvørvisstovuni til, at økið verður matrikulerað frá ognini matr. nr. 469 a, Eiði.

Keypssáttmáli kann gerast við fysiskar persónar, feløg ella aðrar løgfrøðisligar persónar. Er talan um samtøk av fyritøkum skal samstarvið verða skjalfest og viðleggjast. Tann, sum bjóðar, skal lúka allar galdandi ásetingar í hesi útbjóðing.

Útbjóðingartreytirnar verða einans nýttar í sambandi við, at tilboð verða givin, og eftirfylgjandi í sambandi við, at keypssáttmáli verður gjørdur. Útbjóðingartreytirnar innihalda í høvuðsheitum vegleiðingar og krøv til tilboðsgevarar.

2. ÚTBJÓÐINGIN

Gamla kampingøkið er partur av ognini matr. nr. 469 a, Eiði. Byggiøkið verður matrikulerað frá, so tað verður sjálvstøðugt matr. nr. Grundøkið verður umleið 2.800 $m^2$ til víddar.

Kommunan eigur økið og er sinnað at selja økið til íbúðarbygging. Prísurin fyri økið er 50.000 kr. pr. íbúð. Tað er upp til vinnandi tilboðsgevaran hvussu hann skipar seg og um tað er við eigaraibúðum, leiguíbúðum ella lutaíbúðum.

./. Tilboðsgevarin avgreiðir byggiloyvi við byggimyndugleikan hjá Eiðis kommunu. Byggingin skal fara fram eftir galdandi bygningskunngerðini 2017 og fylgja byggisamtyktini fyri økið, t.e. byggisamtykt fyri Eiðis kommunu seinast broytt tann 24. juni 2019, sum er viðløgd sum fylgiskjal 1.

Tilboðsgevarin skipar og rindar sjálvur fyri hitaorkukeldu. Kommunan tryggjar, at streymveiting er atkomilig. Tilboðsgevarin skipar og rindar sjálvur fyri streymveiting inni á økinum, herundir íbindingargjøld. Tilboðsgevarin skipar og rindar sjálvur fyri telefonsamband. Kommunan leggur kloakk- og vatnleiðingar at binda í við vegin og tilboðsgevarin skipar og rindar sjálvur fyri kloakk- og vatnleiðingum annars.

5. TREYTIR TIL BYGGINGINA

Byggingin skal verða liðug til seinast í 2021. Tilboðsgevarir skulu upplýsa, nær teir væntandi kunnu fara undir byggingina.

Tað skulu vera bygdar minst 5 íbúðir. Tað stendur tilboðgevarunum frítt fyri at skipa íbúðirnar sum eigaraíbúðir, lutaíbúðir, leigubústaðir og eldraíbúðir. Fjøllbroyttir bústaðarmøguleikar hava stóran fyrimun í mun til minni fjøllbroyttar møguleikar. Um tað eru eigaraíbúðir skal tilboðsgevarin skipa fyri at eigarafelag verður sett á stovn.

Tað listarliga hevur stóran týdning, tí kommunan ynskir, at íbúðirnar fella væl inn í landslagið. Byggilistin verður raðfest ovarlaga í metingini av vinnarauppskotinum.

Kommunan ynskir at ein partur av økinum verður fríøki. Kommunan ynskir, at tilboðgevarir hugsað um at skipa fríøki og/ella uttanumøkið soleiðis, at tað verður innbjóðandi, nossligt og væl frágingið.

Parkering skal skipast soleiðis, at tað lýkur ásetingarnar í byggisamtyktini og bygningskunngerðini 2017.

Byggingin skal verða gjørd samsvarandi góðum handverki. Bygningarnir skulu hava skilagóðan og umhvørvisvinarligan rakstur og orkunýslu. Helst skulu verða felagshølir til rusksavnan.

## 3. TILBOÐINI

Tilboðsgevarin skal greiða frá, hvussu hann er førur fyri at fullføra verkætlanina og hvørjir luttakarnir eru, t.e. tekniskir ráðgevar, arbeiðstakarar, fíggjarstovnur vm.

Ítøkiliga skal tilboðsgevarin lýsa neyðugu fakligu førleikarnar við manning, útgerð og evt. tilvísingum til aðrar verkætlanir. Við tilboðnum skal fylgja ein yvirskipað tíðarætlan fyri, hvussu verkætlanin verður fullførd innan ásettu tíð.

Tilboðsgevarin skal eisini greiða frá, hvussu hann megnar fíggjarliga at fullføra verkæltanina. Váttan frá fíggjarstovni skal viðleggjast. Um kommunan metir tað vera neyðugt, kann kommunan biðja um fleiri upplýsingar um fíggjarligu viðurskiftini, herundir váttan frá fíggjarstovni v.m. og faktisku viðurskiftini hjá tí, ið bjóðar. Slíkir upplýsingar verða viðgjørdir í trúnaði.

Tilboðsgevarir skulu lata skitsuuppskot sum lýsir hvussu økið kann skipast við íbúðarbygging, fríøki og parkering. Vinnandi tilboðsgevarin skal út frá skitsuppskotinum lata kommununi verkætlanaruppskot og frágreiðing um hvussu bygging verður løgd til rættis og verður útint í verki.

Skitsuuppkotið skal í minsta lagi fevna um fylgjandi

(a) Støðumynd í máti 1:500 sum lýsir byggingina, parkeringsøki, uttamumøki og evt. fríøki og hvussu tað verður skipað í mun til hvørt annað;
(b) Skitsur í máti 1:500 sum vísir flatmyndir og útsíður
(c) Frágreiðignar um íbúðirnar og støddirnar
(d) Yvirskipað tíðarætlan fyri hvussu verkætlanin verður liðug til seinast í 2021.

## 6. TÍÐARFREISTIR OG MANNAGONGD

./. Boð skulu vera latin við fyriskrivaðum boðoyðublaði (fylgiskjal A) við skitsuuppskotinum og í afturlatnum brævbjálva, ið er frámerktur “Útbjóðing uppá íbúðarbygging.”

Boðið skal vera Djóna Thomassen, adv., í hendi í seinasta lagi

hósdagin tann 25. juni 2020 kl. 12

á skrivstovu hansara Bøgøta, Postboks 164, 110 Tórshavn. Boð, ið verða latin persónliga, skulu latast í móttøkuni á skrivstovuni.

Boðini verða latin upp á kommunuskrivstovuni, Brekkuvegur 37, 470 Eiði, sama dag kl. 14. Opið er fyri teimum, sum hava latið boð inn, og verða boðini latin upp við upplýsing um, hvør bjóðarin er og hvussu nógvar íbúðirnar eru. Avgerðin um hvør vinnur útboðið, verður tikin av kommununi innan 4 vikur eftir, at boðini eru latin upp.

Vinnandi tilboðsgevarin átekur sær at menna verkætlanaruppskot innan 8 vikur eftir at vinnandi tilboðið er kunngjørt. Umsitingin í kommununi tilskilar sær rætt til at gera broytingar í verkætlanaruppskotinum saman við tilboðsgevaranum.

## 7. FYRISPURNINGAR

Allir fyrispurningar viðvíkjandi útbjóðingini skulu stílast til Djóna Thomassen, adv., á bústaðnum, ið nevndur er í grein 4, ella á telefon +298788400 ella við teldubræv til djoni@adv.fo.

Allir fyrispurningar viðvíkjandi innihaldinum í útbjóðingartilfarinum ella viðvíkjandi mannagongdini í sambandi við útbjóðingina skulu vera skriftligir og stílast til Djóna Thomassen, adv. Einans fyrispurningar viðvíkjandi staðfesting av upplýsingum í útbjóðingartilfarinum kunnu verða settir umvegis telefon.

Allir skriftligir og telefoniskir fyrispurningar, sum kommunan metir kunnu hava almennan áhuga fyri onnur, ið bjóða, verða svaraðir skriftliga. Fyrispurningur og svar verður sent til øll, ið hava umbiðið útbjóðingartilfarið. Tað framgongur ikki, hvør setti fyrispurningin. Fyrispurningar kunnu ikki setast seinni enn 14 dagar undan freistini fyri at lata boð inn, og kommunan sendir ikki svar út seinni enn 7 dagar undan hesi freist.

## 8. MEGINRELGUR FYRI METING AV TILBOÐUM

Fyri útbjóðingina sum heild verður einans mett um boð frá tilboðgevarum, sum lúka treytirnar, ið eru ásettar í útbjóðingartilfarinum, og har kravd dokumentatión v.m. er viðløgd. Tað verður sæð burtur frá órealistiskum boðum og boðum frá tilboðsgevarum, sum kommunan ikki metir megna uppgávuna.

Meginreglan er, at tað besta boðið verður valt, og verður í tí sambandi m.a. støða tikin til fylgjandi metingarstøð

(a) Tal av íbúðum. Tað er ein fyrimunur um tað eru leiguíbúðir og um tað er fjølbroyttur bústaðarmøguleiki. Er talan um leiguíbúðir er lágt leigugjald ein fyrimunur
(b) Byggilist og handverk og orkuvinarligar loysnir
(c) Uttanumøkið

Umsitingin hjá kommununi ger eina heildarmeting av innlatnum tilboðum, og við grundarlagi í omanfyri nevndu atlitum innstillar umsitingin tað tilboð til bygdaráðið, sum umsitingin metir vera besta tilboðið. Umsitingin kann heita á ráðgevar í sambandi við metingina av tilboðum men hesir eru einans vegleiðandi.

Bygdaráðið tekur avgerðina. Bygdaráðið kann velja at havna øll tilboð og/ella avlýsa útboðið um einki tilboð verður mett nøktandi.